# Fiskiskapur og stongdar havnir

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Skrið ella stormur av útnyrðingi og kavæælingur. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og kavæælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og sólglottar, men eisini okkurt kavæælið. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, týsdagin lækkar hann niður í eystan . Kavæælingur og hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig.

VITJAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikudagin var tíðindafundur í Tinganesi í samband við, at kanadiski sendiharrin í Keypmannahavn, Fredericka Gregory, er á vitjan í Føroyum. Tað vóru løgmaður, Jóannes Eidesgaard, Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og sendiharrin, sum førdu orðið á fundinum.

Á vitjanini í Føroyum hevur málið um stongdu havnirnar í Kanada verið høvuðsumrøðuevni.

Føroyskir og kanadiskir myndugleikar eru ósamdir um føroysku rækjuveiðina í umstrídda økinum, 3L á Grand Bank, sum er altjóða sjógvur.

Føroyingar halda seg - søguliga - eiga størri veiðirættindi í økinum, enn okkum sambært NEAFC-býtinum eru tillutað, og tí vilja okkara myndugleikar ikki góðtaka býtið av rækjukvotuni.

Kanada hevur nú á øðrum sinni "svarað aftur" við at steingja sínar havnir fyri føroyskum skipum, sum tískil ikki sleppa at leggja veiðina upp har yviri.



*Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, kanadiski sendiharrin í Keypmannahavn, Fredericka Gregory og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Kanadisku havnirnar hava áður verið stongdar fyri okkara skipum, men myndugleikarnir har yviri avgjørdu umsíðir at lata havnirnar uppaftur, tá ið føroysku myndugleikarnir tóku rækjuskipini av aftur øki 3L.

Í fjør heyst varð aftur roynt at finna semju í stríðnum um Grand Bank, men hetta eydnaðist ikki.

Tískil fóru føroysku skipini innaftur á leiðina at royna í endanum av seinasta ári, tá ið økið læt uppaftur eftir friðing.

Úrslitið er, at Kanada aftur hevur avgjørt at steingja sínar havnir fyri føroyingum.

Bæði løgmaður, Jóannes Eidesgaard og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, tykjast halda fast um, at føroyingar eru fyri vanbýti í altjóða sjógvi á Grand Bank – og tískil eru smá útlit til, at kanadisku havnirnar verður lætnar uppaftur fyri føroyingum í bræði.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 6 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -4 |
| Kiev | -7 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 11 |
| Malta | 11 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | -2 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1037 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 993 hPa. eystan fyri Jan Mayen fer spakuliga í landsynning og dýpist.




**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið yvir Norska Havinum fer í landsynning og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/3 kl. 06[00]– 10/3. 06[00]. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 9/3 kl. 06[00]– 10/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 3,8 mm

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

11. mars

8. mars Mánin næstur jørðini
10. mars tendring
17. mars Fyra kvarter
19. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11.mars | 07.16 | 19.39 | 06.16 | 18.39 | 06.31 | 18.54 | 09.16 | 21.39 | 10.16 | 22.39 | 05.31 | 17.54 | 04.31 | 16.54 | 07.31 | 19.54 | 08.31 | 20.54 | 07.01 | 19.24 | 08.16 | 20.39 |
| 12.mars | 08.01 | 20.24 | 07.01 | 19.24 | 07.16 | 19.39 | 10.01 | 22.24 | 11.01 | 23.24 | 06.16 | 18.39 | 05.16 | 17.39 | 08.16 | 20.39 | 09.16 | 21.39 | 07.46 | 20.09 | 09.01 | 21.24 |
| 13.mars | 08.46 | 21.09 | 07.46 | 20.09 | 08.01 | 20.24 | 10.46 | 23.09 | 11.46 | - | 07.01 | 19.24 | 06.01 | 18.24 | 09.01 | 21.24 | 10.01 | 22.24 | 08.31 | 20.54 | 09.46 | 22.09 |
| 14.mars | 09.32 | 21.55 | 08.32 | 20.55 | 08.47 | 21.10 | 11.32 | 23.55 | 00.09 | 12.32 | 07.47 | 20.10 | 06.47 | 19.10 | 09.47 | 22.10 | 10.47 | 23.10 | 09.17 | 21.40 | 10.32 | 22.55 |
| 15.mars | 10.19 | 22.43 | 09.19 | 21.43 | 09.34 | 21.58 | - | 12.19 | 00.55 | 13.19 | 08.34 | 20.58 | 07.34 | 19.58 | 10.34 | 22.58 | 11.34 | 23.58 | 10.04 | 22.28 | 11.19 | 23.43 |

5 707265 100067 >